ISBN 99918-971-3-5

# Fullveldislandsstýrið 1998-2002

Dennis Holm[1]

*Granskingardepilin fyri Økismenning*
www.region.fo

**NÁMSRIT 3/2003**

*Um námsrit:*
**Námsrit eru rit, ið kunnu nýtast sum undirvísingartilfar í føroyska skúlaverkinum, eitt nú í miðnáms- og handilsskúlum. Námsrit eru frágreiðandi lýsingar av samfelagsligum evnum og vera altíð skrivaði á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Námsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

[1] Dennis Holm arbeiðir dagliga sum granskari við Granskingardepilin fyri Økismenning.

# Innihaldsyvirlit

**Inngangur** ... 3
**Løgtingsvalið 1998** ... 3
Búskaparkreppan ... 4
Kreppan í føroyska fíggjarheiminum: Bankamálið ... 4
Kanning av Bankamálinum ... 6
Treytir í smb. við nýggj lán og umskiping av uttanlandaskuldin ... 7
Umskipan av fiskivinnuni á landi: Føroya Fiskavirking ... 9
Krav um umsetiligar kvotur í Føroyum ... 9
Treytir í smb. við eina møguliga føroyska oljuvinnu í framtíðini ... 10
Valstríðið 1998 ... 10
**Fullveldislandsstýrið** ... 12
Frá heimastýrislóg til samveldissáttmála ... 13
Fullveldisætlanin – ein ætlan í 4 stigum ... 14
1. stig: Fullveldið sum politiskt mál ... 14
2. stig: Kanningar, útgreiningar og fyrireikingar ... 15
3. stig: Samráðingar ... 16
4. stig: Demokratiska avgerðin ... 16
**Sjálvar samráðingarnar** ... 17
Samráðingarnar 17. mars 2000 ... 17
Danska stjórnin greiða støðu ... 18
Samráðingarfundir 2. mai, 15. juni og 26. oktober 2000 ... 19
Samráðingarnar enda 26. okt. 2000 ... 19
Fólkaatkvøða í apríl 2001 ... 19
Fólkaatkvøðan avlýst ... 20
Samgonguavtala 9. mars 2001 ... 21
**Fullveldisætlanin vend á høvdið** ... 22
**Løgtingsvalið 2002 og nýggj samgonga** ... 22
**Bókmentir** ... 24

**Útgávur av Námsrit**

| | | |
|---|---|---|
| Námsrit 1/2002: | Uppgerð av Løgtingsvalinum. | Dennis Holm og Bjarni Mortensen |
| Námsrit 2/2003: | Ung í Føroyum. | Firouz Gaini |
| Námsrit 3/2003: | Fullveldislandsstýrið 1998-2002. | Dennis Holm |

Námsritini finnur tú á heimasíðuni hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning: www.region.fo

# Inngangur

Endamálið við hesum riti er at gera eina stutta lýsing av sokallaða fullveldislandsstýrinum, sum samgongan millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin í árunum 1998-2002 vanliga verður nevnd.

Fullveldislandsstýrið kann sigast at umboða ein nýggja tíð í føroyskum politikki, har spurningurin um *fullveldið Føroyar* fyri fyrstu ferð varð settur ovast á politisku dagskránna. Upprunaætlanirnar á fullveldisleið vóru í byrjanini nógvar og víttfevnandi, men vórðu hesar ætlanir tó broyttar sum frá leið. Í ritinum verða upprunaætlanirnar hjá Fullveldislandsstýrinum lýstar. Harumframt verður samráðingarumfarið við donsku stjórnina eisini viðgjørt í stuttum. Hesar samráðingar førdu m.a. við sær, at tann upprunaliga fullveldisætlanin varð broytt.

Ritið er býtt í fýra partar. Í *fyrsta parti* verða løgtingsvalið í 1998 og tíðin undan valinum viðgjørd. Hetta tíðarskeiðið hevur stóran týdning fyri politisku dagsskránna og politisku gongdina í Føroyum í tíðarskeiðinum 1998-2002. *Annar partur* er ein lýsing av Fullveldislandsstýrinum og teimum ætlanum, ið landsstýrið hevði á fullveldisleið. Í *triðja parti* er ein lýsing av samráðingunum við donsku stjórnina, har eisini verður nomið við tær avleiðingar, ið hesar samráðingar fingu fyri ætlaðu fullveldistilgongina. *Fjórði og seinasti partur* viðger samgonguavtaluna, ið gjørd varð 9. mars 2001. Hendan avtala førdi við sær, at upprunaliga fullveldisætlanin varð vend á høvdið.

# Løgtingsvalið 1998

Ríkisrættarliga støðan gjørdist høvuðsevnið til løgtingvalið 30. apríl 1998. – Hetta serliga tí, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark orsaka av búskaparkreppuni fyrst í 1990unum og politisku avleiðingunum av kreppuni, vórðu broytt munandi til tað verra í 1990unum.

## Búskaparkreppan

Tað vóru fleiri orsøkir til, at Føroyar vórðu raktar av eini búskaparkreppu fyrst í 1990unum. Fiskivinnan á landi og sjógvi megnaði ikki, hóast nógvan almennan stuðul øll 1980 árini, at skapa eina lønsama framleiðslu. Hetta førdi við sær stór undirskot innan fiskivinnuni, sum av somu orsøk uppbygdi stór lán, íð m.a. føroysku peningastovnar veittu. Millum orsøkirnar til, at fiskivinnan ikki megnaði at skapa lønsemi, vóru minkandi veiðunøgdir og fallandi prísir á evropeisku fiskamarknaðunum, hetta seinna orsaka av, at stórar nøgdir av eystur-evropeiskum fiski floymdi inn á marknaðin (Apostle et. al., 2002). Vantandi avkast í fiskivinnuni førdi við sær, at stórur partar av vinnuni á bæði landi og sjógvi komu í stórar trupulleikar, og nógv virki og skip fóru á húsagang. Avleiddar vinnur vórðu eisini hart raktar og var tíðarskeiðið merkt av stórum arbeiðsloysi kring landið, og førdi hetta aftur við sær, at nógv fólk fluttu av landinum.

Kreppan í vinnuni rakti á heysti í 1992 eisini føroyska fíggjarheimin (sí eisini niðanfyri), og førdi hetta við sær, at landsstýrið í fleiri førum mátti læna 100 tals milliónir kr. at seta í teir báðar stóru føroysku bankarnar. Men harumframt førdi kreppan eisini við sær, at Føroyar vórðu veruliga settar undir umsiting, tað vil siga, at rásarúm føroyinga til at taka politiskar avgerðir varð avmarkað (sí eisini niðanfyri). Harumframt kravdi danska stjórnin í fleiri førum, at ávís politisk tiltøk skuldu fremjast í Føroyum fyri at fáa skil á aftur búskapinum og fyri at fáa greiðan skilnað millum, hvat var alment og hvat var privat. Hesi viðurskifti verða lýst nærri niðanfyri.

## Kreppan í føroyska fíggjarheiminum: Bankamálið

Tann 6. oktober 1992, á 60 ára føðingardegnum hjá Sjóvinnubankanum, bórust tíðindi um landið, at landsstýrið hevði lænt 500 mio. kr. frá donsku stjórnini fyri at bjarga Sjóvinnubankanum (Fregnir, 25. sept. 2002). Hetta var byrjan til tað, vit í dag kenna sum *Bankamálið*. Stutta tíð eftir, at landsstýrið bjargaði Sjóvinnubankanum við eini peningainnspræning uppá 500 mio. kr., varð greitt, at Føroya Banki eisini var í trupulleikum. Í desember í 1992 skeyt Den Danske Bank, sum var høvuðspartaeigari í Føroya Banka, í fyrsta umfari 332 mio. kr. í Føroya Banka – og boðaði Den Danske

Bank samstundis frá, at hann fór at standa aftanfyri sín banka í Føroyum (Fregnir, 25. sept. 2002). Við endan av januar 1993 noyddist landsstýrið aftur at skjóta inn penging í Sjóvinnubankan, hesaferð 350 mio. kr.

Ein liður í ætlanini at bjarga Sjóvinnubankanum í okt. 1992 var, at ein grunnur, *Fíggingargrunnurin frá 1992*, skuldi stovnast, og hesin skuldi eiga partapeningin í bankanum (Statsministeriet, 1992). Hesin grunnur kom seinni at hava ein týdningarmiklan leiklut í Føroyum við tað, at hann bleiv eigari av føroysku bankunum, umframt at hann kom at standa fyri umskipanini av fiskivinnuni á landi. Á pappírinum eigur landsstýrið Fíggingargrunnin, men í avtaluni við donsku stjórnina varð ásett, at Fíggingargrunnurin skuldi skipast við 5 manna nevnd, sum danska stjórnin valdi 3 limir í og landsstýrið valdi 2 limir (Fregnir, 1. nov. 2002)[2]. Danska stjórnin valdi eisini formannin, sum tað fyrsta tíðarskeiðið varð Richard Mikkelsen, fyrrverandi stjóri í danska tjóðbankanum.

Tann 22. mars 1993 vórðu eigaraviðurskiftini í báðum bankunum broytt, eftir stórum trýsti frá donsku stjórnini. Fíggingargrunnurin frá 1992 kom hereftir at verða høvuðspartaeigari í bæði Sjóvinnubankanum og í Føroya Banka, við tað at Fíggingargrunnurin keypti partabrøv frá den Danske Bank, sum var høvuðspartaeigari í Føroya Banka. Eftir partabrævaumskiftið átti den Danske Bank 30 % av Føroya Banka og 30 % av Sjóvinnubankanum. Samanborið við støðuna frammanundan partabrævaumskiftinum, so førdi hetta við sær, at Den Danske Bank ikki longur hevði nakrar skyldur sum høvuðspartaeigari í Føroya Banka. Á fundi millum donsku stjórnina, Føroya landsstýrið og Den Danske Bank 17. mars 1993, t.v.s. áðrenn partabrævaumskiftið, vísti stjórin í Den Danske Bank á, at tað ikki var tørvur á at skjóta meiri pening inn í Føroya Banka. Fíggjareftirlitið, sum eisini var við á fundinum, tók eisini undir við hesi útsøgn, at Føroya Banka tørvaði ikki meiri pening. Stutta tíð eftir partabrævaumskiftið vísti tað seg tó, at allur sannleikin ikki varð sagdur, og vísti tað seg eisini seinni, at landsstýrið hevði yvirtikið ein banka fyri væl størri virði, enn hildið varð *– og gjørdist júst hetta kjarnin í Bankamálinum.*

---

[2] Hetta er seinni (í smb. við avtaluna millum donsku stjórnina og landsstýrið frá 10. juni 1998) broytt, soleiðis at danska stjórnin ikki longur er partur í Fíggingargrunninum. Hendan broyting varð gjøgnumførd, tá nýggj nevnd varð vald í Fíggingargrunnin í februar 1999.

Partabrævaumskiftið ávirkaði tó ikki tann veruleika, at bankarnir báðir framvegis vóru í stórum fíggjarligum trupulleikum. – Og við endan av mai mánaða 1993 noyddist landsstýrið aftur at læna pengar at seta í báðar bankarnar, hesaferð 560 mio. kr. Á sama fundi millum donsku stjórnina og landsstýrið varð eisini gjørd avtala um endur- og umfígging av føroysku uttanlandsskuldini (Føroya Landsstýri, 1993b).

Í august mánaða 1993 vórðu bankarnir báðir lagdir saman, og Fíggingargrunnurin frá 1992 gjørdist einaeigari av tí nýggja bankanum, sum kom at eita Føroya Banki. Alment varð víst á, at samanleggingin varð gjørd fyri betri at kunna samskipa saneringina av føroyska vinnulívinum. Harumframt varð eisini víst á, at tað vóru ávísar sparingar við at leggja bankarnir saman. Kritikkarir vístu tó á, at bankarnir vórðu lagdir saman fyri at den Danske Bank skuldi sleppa undan móðurfelagsábyrgd síni av dótturfelagnum, (gamla) Føroya Banka.

Ein mánaða eftir, at bankarnir vórðu lagdir saman, vísir ein grannskoðannarfrágreiðing av hálvársroknskapinum hjá (gamla) Føroya Banka, at leiðslan í (gamla) Føroya Banka hevur latið eyguni aftur fyri stórum tapum, sum vóru fyri framman, áðrenn partabrævaumskiftið og áðrenn samanleggingini av bankunum báðum í mars 1993. Eisini varð víst á, at peningurin, ið varð skotin inn í bankan í mai var ikki nøktandi. Um miðan oktober í 1993 noyddist landsstýrið tí aftur at læna 1,3 mia. kr. at seta í nýggja Føroya Banka (Føroya Landsstýri. 1993c), og varð hetta tann seinasta peningainnspræningin, ið landsstýrið mátti gera í Føroya Banka. Samanlagt setti landsstýrið í 1992 og 1993 2,4 mia. í báðar bankarnar, Sjóvinnubankan og Føroya Banka.

## Kanning av Bankamálinum

Longu í oktober í 1993, tá landsstýrið noyddist at læna 1,3 mia. kr. at seta í Føroya Banka, setti táverandi løgmaður, Marita Petersen, fram krav um, at ein óvildug kanning skuldi gerast av Bankamálinum. Hetta krav varð víst aftur av donsku stjórnini, sum tvíhelt um, at alt var farið rætt fram. Men kjakið um Bankamálið helt áfram í Føroyum, og í føroyskum og donskum fjølmiðlum, og í januar 1994 samtykti løgtingi einmælt, at ein dómarakanning skuldi gerast av Bankamálinum. Danska stjórnin vísti hesum aftur

og avgjørdi, at ein sokallað ”ekspert-undersøgelse” skuldi gerast. Danska stjórnin setti eisini, uttan føroyskt samtykki, eina nevnd, sokallaða *Grønborg-nevndin*, at viðgera føroyska Bankamálið.

Stríðið um, hvat slag av kanning skuldi gerast av Bankamálinum, førdi til stóra ósemja millum Føroyar og Danmark. Hetta førdi eisini við sær, at landsstýrið legði sak ímóti donsku stjórnina í hesum sambandi í 1998. Úrslitið av stevningini varð, at semja varð gjørd millum landsstýrið og donsku stjórnina tann 10. juni 1998 (eftir løgtingsvalið 30. apríl 1998). Við hesu semju varð føroyska skuldin til danska statskassan (uttanlandaskuldin) niðurskrivað við 900 mio. kr. umframt at 500 mio. kr. vórðu niðurfrystar (og skulu bert gjaldast aftur, um Føroyar fáa stórar inntøkur av olju í føroysku undirgrundini). Harumframt bant danska stjórnin seg eisini til at samráðast um eina tillaging av føroyska búskapinum, nú nýggja samgongan (eftir valið í 1998 – sí eisini niðanfyri) hevði sett spurningin um føroyskt fullveldi ovast á dagsskránna.

Sum vera man var Bankamálið eisini eitt av evnunum, ið vóru uppi í valstríðnum til løgtingsvalið í 1998, hetta einamest orsaka av, at Bankamálið og búskaparkreppan vóru høvuðsorsøkirnar til, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark vóru vorðin so vánalig í 1990unum. Hartil varð frágreiðingin frá Grønborg-nevndini almannakunngjørd í januar 1998, og sum Sosialurin málber seg, so avdúkaði frágreiðingin fleiri skálkar í Bankamálinum (Sosialurin, 23. mars 2000). Harumframt vórðu fleiri av teimum duldu viðurskiftunum viðvíkjandi partabrævabýtinum í føroysku bankunum í mars 1993 avdúkað. Sostatt prógvaði Grønborg-frágreiðingin eisini nógvar av ákærunum frá føroyskum og donskum fjølmiðlumum, at alt ikki varð farið rætt fram, og at landsstýrið og føroyski skattgjaldarin varð snýttur av donsku stjórnini og den Danske Bank.

## *Treytir í smb. við nýggj lán og umskiping av uttanlandaskuldin*

Umframt sjálvt Bankamálið vóru eisini fleiri onnur mál, sum førdi við sær, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark gjørdist sera vánalig í hesum tíðarskeiði. Ein av høvuðsorsøkunum til hetta vóru tey krøv, ið stjórnin setti føroyingum í samband við upptøku av nýggjum lánum og umskipan av føroysku uttanlandaskuldini. Í árunum

1993-1997 varð føroyska uttanlandaskuldin umskipað og endurfíggjað (umframt at nýggj lán vórðu tikin), soleiðis at danski staturin eftir hetta varð einasti lánsveitarin hjá føroyingum. Men við hesi umskipan og endurfíggjan fylgdu eisini treytir frá donsku stjórnini. Hesar treytir fevndi m.a. um

- umskipan av fiskivinnuni á landi
- krøv um umsetiligar kvotur í Føroyum
- treytir í smb. við eina møguliga føroyska oljuvinnu í framtíðini

Talan var um krøv, sum vildu føra við sær grundleggjandi broytingar av føroyska vinnulívinum. Afturat hesum krøvum vóru eisini onnur krøv um m.a. bygnaðarbroytingar í landsumsitingini (Føroya Landsstýri, 1994), krøv um umskipan av kommunala bygnaðinum (Føroya Landsstýri, 1993d), umframt nýggjar lógir á vinnuligu økinum, t.d. nýggja partafelagslóg og nýggja banka- og sparikassalóg (Føroya Landsstýri, 1993a). Harumframt setti danska stjórnin eisini fram fleiri onnur krøv m.a. í samband við rationaliseringar og sparingar av almennum útreiðslum í Føroyum. Hesi krøv fevndu m.a. um (Fregnir, 1. nov. 2002):

- at bygdarskúlar skuldu niðurleggjast
- at sjúkrahús skuldu niðurleggjast
- at skatturin skuldi hækkast
- at kommunur skuldu leggjast saman
- at minstalønin hjá fiskimonnum skuldi broytast
- at Atlantsflog skuldi niðurleggjast

Nøkur av hesum krøvunum vórðu gingin á møti, m.a. varð skatturin hækkaður munandi, umframt at fyrstu stigini vórðu tikin til broyta føroyska kommunubygnaðin. Fleiri av krøvunum vórðu tó eisini víst aftur, men kunnu krøvini í stóran mun sigast vera dømi um, at danir beinleiðis løgdu seg út í innanhýsis føroysk viðurskifti – og er tað m.a. annað hetta, ið sipað verður til, tá sagt verður, at Føroyar vórðu settar undir danska umsiting.

## Umskipan av fiskivinnuni á landi: Føroya Fiskavirking

Umframt at verða partur av bjargingini av føroysku bankunum, skuldi Fíggingargrunnurin eisini taka stig til og luttaka í umskipanini av fiskivinnuni á landi (Finansieringsfonden af 1992). Hendan umskipan byrjaði á vári 1993, tá Richard Mikkelsen, táverandi formaður í Fíggingargrunninum, legði fram ætlanir um, at eitt móðirfelag skuldi stovnast, sum skuldi eiga øll flakavirkini í landinum. Ein liður í hesi ætlan var eisini, at stórir partar av skuldini í flakavirkjunum skuldi sanerast undir einum.

Í juni 1993 varð felagið *Føroya Fiskavirking* stovnað og 19 av teimum 22 flakavirkjunum í landinum vórðu savnaði í hesum móðurfelagnum. Av teimum størri virkjunum fingu Kósavirkið í Klaksvík og Fisk í Hvalba loysnir í lag uttanfyri Føroya Fiskavirking, og fóru hesi virkini sostatt ongantíð uppí Føroya Fiskavirking.

Stutta tíð eftir, at Føroya Fiskavirking var farið at virka, varð gjørt av, at framleiðsla skuldi bara verða á 6-8 av teimum 19 flakavirkjunum. Hetta førdi við sær stórt arbeiðsloysi, og vórðu ávís øki í landinum serliga hart rakt, m.a. Sandoyggin og sunnara helvt í Suðuroy[3].

## Krav um umsetiligar kvotur í Føroyum

Upp gjøgnin 1980ini vaks veiðutrýstið í føroyskum sjógvi alsamt. Økta veiðutrýstið førdi ikki við sær økta veiðu, og var hetta eisini ein orsøkin av mongum, ið førdi til búskaparkreppuna. Hesir trupulleikar vórðu eisini viðgjørdir í landsstýrinum, og vóru ítøkiligar ætlanir frammi um at seta í verk eina kvotaskipan. Eisini frá danskari síðu vóru ætlanir hesum viðvíkjandi, og legði danska stjórnin í fleiri umførum á fundi við landsstýri í 1993 trýst á landsstýri fyri at seta í verk eina skipan við umsetiligum kvotum (Føroya Landsstýri, 1993d).

Umframt, at umskipanin av fiskivinnuni á landi varð umrødd á fundi millum landsstýrið og donsku stjórnina í november 1994, vórðu krøvini um umsetiligar kvotur eisini settar fram á hesum fundi (Holm, 1997). Danska stjórnin kravdi, at Føroyar settu í verk eina

[3] Flakavirkið í Vági var tó ígongd tað fyrstu tíðina undir Føroya Fiskavirking, men varð afturlatið á sumri í 1994.

skipan við umsetiligum kvotum, og hetta góðtók landsstýrið á fundinum í November 1994. Løgtingið góðtók tó ikki hetta krav og valdi ístaðin at seta í verk føroyska uppskotið um kvotaskipan, sum varð gjørt í samráð við føroysku vinnuna. Hendan skipan varð seinni broytt til ta fiskidagaskipan, sum vit framvegis hava í dag.

### Treytir í smb. við eina møguliga føroyska oljuvinnu í framtíðini

Ein onnur treyt í smb. við umskipan av føroysku uttanlandsskuldini snúði seg um eina møguliga føroyska oljuvinnu í framtíðini. Rættindini til at gagnnýta ráevni í føroysku undirgrundinum vórðu yvirtikin sum føroyskt málsøkið í desember 1992, eftir at avtala varð gjørd hesum viðvíkjandi í september 1992.

Í sjálvari avtaluni í samband við yvirtøkuna av ráevnum í føroysku undirgrundini verður eisini sagt, at danskt vinnulív og sakkunnleiki skulu brúkast, um hesi eru kappingarfør (Føroya Landsstýri, 1992). Á fundi um kreppuna í føroyska búskapinum og føroyska fíggjarheiminum í okt. 1993 vísti danska stjórnin eisini hesum partinum av avtaluni um ráevni í undirgrundini áhuga (Føroya Landsstýri, 1993d).

Eitt notat, ið danska stjórnin gjørdi í hesum sambandi, legði eisini upp til, at eitt dansk-føroyskt oljufelag varð stovnað, ið skuldi hava danska felagið DONG sum høvuðssamstarvsfelaga (Holm, 1997). Harumframt skuldi hetta felag hava framíhjárættindi í smb. við oljuleiting og –boring á føroyska landgrunninum. Ætlanin um eitt dansk-føroysk felag varð tó ongantíð sett í verk.

## *Valstríðið 1998*

Undan løgtingsvalinum í 1998 løgdu flokkarnir hvør í sínum lagi fram uppskot um, hvussu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark skuldu skipast í framtíðini – og tóktist allir teir stóru flokkarnir vera sinnaðir at broyta viðurskiftini millum londini bæði (Sølvará, 2002: 374). Mest víðgongt var uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum, sum legði upp til, at farast skuldi undir eina skipaða loysing, sum stig fyri stig skuldi gera Føroyar til sjálvstøðuga tjóð. Fólkaflokkurin fór hinvegin til val við tí sonevndu íslendsku loysnini, sum skuldi geva Føroyum sjálvstýri, samstundis sum ein millumtjóða sáttmáli

varð gjørdur millum Føroyar og Danmark (Sølvará, 2002: 375). Harumframt vísti Fólkaflokkurn á, at blokkurin skuldi kapitaliserast, tvs. at samlaða virði av blokkinum í eitt ávíst áratal fram í tíðina skuldi rindast føroyingum í einum og her og nú. Hetta hevði gjørt føroyingar førar fyri at rinda aftur alla uttanlandaskuldina, umframt at peningar hevði verið eftir til menning av føroyska samfelagnum. Javnaðarflokkurin legði fram ætlanir um, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark skuldu umskipast, men at hendan umskipan ikki skuldi føra við sær loysing ella at Føroyar fóru úr ríkisfelagsskapinum. Tey meiri ítøkiligi uppskotini frá Javnaðarflokkinum[4] um broytingar í ríkisrættarligu støðu Føroya vórðu ikki gjørd fyrr enn nakað eftir Løgtingsvalið í 1998. Sambandsflokkurin helt undan valinum í 1998 fast um, at hann var einasti flokkur, ið vildi varðveita ríkisfelagsskapin í verandi líki, men vóru eisini røddir frammi í Sambandsflokkinum, ið førdu fram, at heimastýrislógin møguliga skuldi dagførast[5]. Fyri Sambandsflokkin var hetta ein stór broyting, tí júst spurningurin um ríkisrættarligu støðuna var orsøkin, til at Edmund Joensen, táverandi løgmaður, hótti við at útskriva nýval, tá samgongufelagin, Fólkaflokkurin, tók undir við at kanna nøkur viðurskifti í heimastýrislógini.

Úrslitið av Løgtingsvalinum 30. apríl 1998 varð, at flokkarnir, ið høvdu kunngjørt, at teir vildu broyta viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, høvdu munandi framgongd, meðan Sambandflokkurin hevði munandi afturgongd. Fyri fyrstu ferð nakrantíð gjørdist Tjóðveldisflokkurin størsti flokkur á løgtingið. Javnaðarflokkurin, sum gjørdist stóri taparin við valið í 1994[6], gjørdist næststørsti flokkur í 1998, og kann úrslitið hjá Javnaðarflokkinum tulkast sum, at Javnaðarflokkurin vann seg aftur á ”normala” støðið, ið flokkurin hevði í 1980árunum, tá flokkurin fekk umleið 21-23 % av atkvøðunum.

---

[4] Her verður sipað til uppskot Javnaðarfloksins um eina Sjálvstýrislóg, ið skuldi tryggja Føroyum størri sjálvræði innanfyri ríkisfelagsskapin.

[5] Seinni gjørdi Sambandsflokkurin eitt meiri ítøkiligt uppskot hesum viðvíkjandi, hetta er sonevnda Nýskipanaruppskotið.

[6] Javnaðarflokkurin gjørdist við valið í 1990 størsti flokkur í landinum við 27,5 % av atkvøðunum og 10 tingmonnum, men gjørdist stóri taparin við valið í 1994, tá flokkurin fekk 5 tingmenn.

| | Løgtingsvalið 1998 | Løgtingsvalið 1994 | Munur | Tingmannatal |
|---|---|---|---|---|
| **Fólkaflokkurin** | 21,3 % | 16,0 % (6) | 5,3 % | 8 |
| **Sambandsflokkurin** | 18,0 % | 23,4 % (8) | -5,4 % | 6 |
| **Javnaðarflokkurin** | 21,9 % | 15,3 % (5) | 6,6 % | 7 |
| **Sjálvstýrisflokkurin** | 7,7 % | 5,6 % (2) | 2,1 % | 2 |
| **Tjóðveldisflokkurin** | 23,8 % | 13,7 % (4) | 10,1 % | 8 |
| **Kristiligi Fólkafl.** | 2,5 % | 6,3 % (2) | -3,8 % | 0 |
| **Miðflokkurin** | 4,1 % | 5,8 % (2) | -1,7 % | 1 |
| **Verkamannafylkingin** | 0,8 % | 9,5 % (3) | -8,7 % | 0 |

## Fullveldislandsstýrið

Samráðingarnar eftir valið endaðu við, at ein samgonga varð skipað, sum legði stóran dent á at fáa greiðu á viðurskiftinum millum Føroyar og Danmark. Samgonga varð skipað millum Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin, sum samanlagt høvdu 18 tinglimir. Galdandi var fyri hesir flokkar, at teir allir vóru farnir til val uppá, at kós skuldi setast ímóti einum sjálvstøðugum Føroyum, ímóti fullveldinum.

Eitt nýtt málsøki varð skipað, ið skuldi taka sær av sjálvstýrismálinum, og varð ein landsstýrismaður settur at umsita hetta málsøkið . Býtið av landsstýrissessum var annars hetta:

- Anfinn Kallsberg, løgmaður, ff. - stýrisskipan og uttanlanda- og kommunumál
- Høgni Hoydal, varaløgmaður., tj. - sjálvsstýrismál og løgmál, norðurlandamál
- John Petersen, lstm., ff. – fiskivinnumál
    - frá 14. desember 1998: Jørgen Niclasen
- Signar á Brúnni, lstm., tj. - undirvísingar- og mentamál
    - frá 28. mars 2000: Høgni Hoydal, vløg., tj.
    - frá 21. juli 2000: Tórbjørn Jacobsen, lstm., tj.
    - frá 14. juni 2001: Óli Holm, lstm., tj.
- Karsten Hansen, lstm., tj. - fíggjar- og búskaparmál
- Finnbogi Arge, lstm., ff. - vinnumál, tó ikki olju- og umhvørvismál
    - frá 18. august 2000: Anfinn Kallsberg, løgm., ff.
    - frá 28. august 2000: Bjarni Djurholm, lstm., ff.

- Eyðun Elttør, lstm., sj. - olju- og umhvørvismál
- Helena Dam á Neystabø, lstm., sj. - almanna- og heilsumál
  - frá 26. februar 2001: Sámal Petur í Grund, lstm., sj.

Hetta var somuleiðis tann fyrsta samgongan í føroyskum politikki, sum orðaði ein greiðan politik viðvíkjandi skipanini av fullveldinum Føroyar. Av somu orsøk verður hetta landsstýrið eisini vanliga nevnt *Fullveldislandsstýrið*.

Men hvørjar vóru so ætlanirnar hjá Fullveldislandsstýrinum? Hví vildi Fullveldislandsstýrið hava fullveldið, og hvussu skuldi gangast á fullveldisleið? Hetta eru nøkur av teimum viðurskiftunum, ið verða lýst í næstu brotunum[7].

| |
|---|
| **Allýsingin av hugtakinum fullveldi er í tveimum (Hvítabók, 1999: 152)**: |
| 1) Fullveldi er einkarrættur at skipa løggevandi vald, útinnandi vald og dømandi vald í einum umveldi, og |
| 2) einkarrættur at umboða umveldið í altjóða høpi. |

## *Frá heimastýrislóg til samveldissáttmála*

*Hví samgonguflokkarnir vilja fullveldi:*

"Tí,

- viðurskiftini millum Danmark og Føroya hava verið merkt av ósemjum og stríði tey farnu árini
- tað er ein áhaldandi og slítandi togan um, hvør tað er, sum hevur tað evsta valdið í Føroyum
- vantandi vitan um og ávirkan á tað, sum hendir í Føroyum, var ein høvuðsorsøk til, at búskaparkreppan fyrst í nítiárunum gjørdist so nívandi
- ásannað verður, at føroyskir myndugleikar vórðu tiknir av ræði hesi árini
- um góð viðurskifti skulu fáast við Danmark aftur, so má valds- og ábyrgdarbýtið millum londini gerast púra greitt

[7] Brotini eru grundað á: www.fullveldi.fo

- føroyska tjóðin skal taka valdið og ábyrgdina av egnum landið
- tá ið vit samstarva sum javnbjóðis partar, ber til at byggja upp eitt virðiligt og mennandi samstarv
- so leingi føroyska tjóðin er undir donskum valdi, fær hon ikki ta ávirkan og teir møguleikar, sum henni tørva fyri at fremja eina tíðarhóskandi menning av samfelagnum eftir egnum fortreytum
- ein avgerandi fortreyt fyri, at vit kunnu taka politiska ábyrgd, er, at vit verða loyst úr teirri búskaparligu og politisku bindingini, sum blokkstuðulin hevur við sær.
- skulu vit í verki standa á egnum beinum, er fyrsta treytin, at vit megna at byggja upp ein sjálvberandi føroyskan búskap
- fullveldið er atgongumerkið, sum gevur fullan rætt til luttøku í millumtjóða samstarvi

Men tað er ógvuliga umráðandi, at tann vanligi borgarin kennir seg tryggan. Hann má kunna fylgja við og vita, hvat hendir á økinum. Besta trygdin fyri, at mistøk ikki verða gjørd, er eitt livandi alment kjak um allar teir spurningar, sum hava samband við fullveldisætlanina." Fyri at náa hesum málinum varð gjørd ein ætlan í 4 stigum.

## *Fullveldisætlanin – ein ætlan í 4 stigum*

### 1. stig: Fullveldið sum politiskt mál

- Samgonguskjal um fullveldið sum politiskt mál eftir valið 30. apríl 1998
- 10. juni 1998: Samráðast skal við danir at gera eina avtalu um, at Føroyar skulu verða eitt fullveldi. Hesar samráðingar skulu snúgva seg um skiftistíðina.
- 18. august 1998: Uppskot frá landsstýrinum um fullveldisætlanina verður lagt fyri Løgtingið og samtykt tann 2. oktober við 18 atkvøðum fyri. Av hinum 14 løgtingslimunum atkvøddu 12 ímóti. Uppskotið staðfestir, at
    - farast skal undir allar neyðugar fyrireikingar til samráðingarnar við Danmark
    - Farast skal undir samráðingar við Danmark um ein nýggjan sáttmála millum londini.

- landsstýrið skal leggja ein frágreiðing og allar fyrireikingar fyri Løgtingi til aðalorðaskiftis, áðrenn farið verður til samráðingar við donsku stjórnina.

- Landsstýrið skeyt upp,
    - at sáttmálin skal fevna um trý felagsøkið millum Føroyar og Danmark: Felags Kongshús, felags gjaldoyra, og felags rættindi fyri danskarar og føroyingar í báðum londunum.
    - at avtala verður gjørd um eina skiftistíð, har blokkstuðulin verður minkaður burtur eftir 15-20 ára skiftistíð
    - at gera avtalu um samstarv á týðandi økjum – innan eitt nú útbúgving, sjúkrahús, uttanríkismál og rættarskipan.

## 2. stig: Kanningar, útgreiningar og fyrireikingar

2. stig í Fullveldisætlanini var at fáa greiðu á, hvat krevst fyri at røkka tí máli, stevnt verður fram móti. Tí setti landsstýrið móti ársloki 1998 serfrøðingabólkar at gera neyðugar kanningar. Hesir vóru:

- Ein *búskaparbólkur*, sum skuldi:
    - lýsa týdningin av blokkstuðlinum og lýsa, hvat krevst í okkara egnu framleiðslu fyri at viga upp ímóti einum minkandi blokkstuðli
    - gera eitt uppskot til langtíðar búskaparpolitikk í eini skiftistíð og í einum sjálvberandi føroyskum búskapi
- Ein *fyrisitingarbólkur*, sum skuldi:
    - Lýsa, hvønn týdning samstarvið við Danmark hevur.
    - umsitingin í teimum ymisku stýrunum gjørdu tilmæli um, hvar tey halda, at samstarvast má við Danmark, og hvar føroyingar kunnu taka við ábyrgdini beinanvegin
- Ein *sáttamálabólkur*, sum skuldi:
    - lýsa tey ríkisrættarligu viðurskiftini
    - gera uppskot um, hvussu farast kann fram, tá broytingar skulu gerast
    - Bólkurin hevur eisini kannað, hvussu onnur lond hava gjørt, tá tey hava fingið fullveldi.
- Ein *grundlógarnevnd*, sum skuldi

- gera uppskot til grundlóg fyri Føroyar.

Úrslitið av hesum fyrireikingararbeiði bleiv sokallaða Hvítabók, sum fevnir um 3 partar, sum vórðu útgivnir í trimum bindum tann *1. september 1999*. Hvítabók viðgerð ymisk viðurskifti, ið hava tilknýti til spurningin um Føroyar sum sjálvstøðug tjóð – sum fullveldið. Harumframt er eisini ein samandráttur av búskapar- og fyrisitingarpartinum, og í tí partinum er eisini frágreiðingin frá sokallaða *sáttmálabólkinum*. Afturat hesum eru so frágreiðingarnar frá *búskaparbólkinum* og *fyrisitingarbólkinum*, og eru hesar frágreiðingar í hvør sínum bindi.

Umframt tey trý bindini í Hvítubók eru eisini fleiri upprit, sum føroyskir og útlendskir serfrøðingar hava gjørt. Hesi upprit eru m.a. brúkt sum grundarlag fyri frágreiðingunum í Hvítubók. Uppritini eru á heimasíðuni: www.fullveldi.fo

### 3. stig: Samráðingar

Í oktober 1999 varð aðalorðaskifti á Løgtingi um Hvítubók. Eftir aðalorðaskifti varð orðað ein greið og ítøkilig ætlan um, hvussu fram skuldi farast..

- Eitt upprit varð skrivað sum grundarlag undir samráðingunum millum landsstýrið og donsku stjórnina.
  - Uppritið varð latið Uttanlandanevnd Løgtingsins í feb. 2000.
- Samráðingar millum landsstýrið og donsku stjórnina byrja í mars 2000

### 4. stig: Demokratiska avgerðin

Tá samráðingarnar við donsku stjórnina eru lidnar:

- skal ein sáttmála gerast millum Føroyar og Danmark
  - sáttmálin skal góðkennast av Fólkatinginum og av Løgtinginum
  - sáttmálin skal síðani til fólkaatkvøðu í Føroyum
- Síðan verður uppskot til føroyska grundlóg lagt fyri Løgtingið
  - Um hetta uppskot verður góðkent, verður fólkaatkvøðu um tað
- Tá grundlógin er farin at virka, er politiska ætlanin komin á mál.

# Sjálvar samráðingarnar

Eftir drúgvar fyrireikingar í Føroyum, byrjaðu samráðingarnar við donsku stjórnina á vári 2000.

## *Samráðingarnar 17. mars 2000*

Fyrsti samráðingardagur var 17. mars 2000, tá landsstýrið fór til Keypmannahavnar at samráðast við donsku stjórnina. Landsstýrið hevði frammanundan gjørt uppskot

- um búskaparliga skiftistíð (viðv. minking av blokkinum yvir 10-15 ár)
- um samstarvsøki innan eitt nú dómsvald, heilsuverk, útbúgvingarverk os.fr.
- um felags viðurskifti viðv. kongshúsi, gjaldoyra
- um, hvussu málsøki skuldu flytast undir føroysk málsræði

Í stuttum gekk uppskotið hjá landsstýrinum annars út uppá, at Føroyar skuldu taka fullveldið ”her og nú” og at avtala hareftir skuldi gerast um, at nøkur málsøki í nøkur ár framyvir framhaldandi skuldu umsitast av donsku stjórnini. Eisini varð lagt upp til, at Føroyar skuldu fáa eina búskaparliga skiftistíð uppá 10-15 ár, soleiðis at føroyski búskapurin skuldi kunna fyrireika seg til at gerast óheftur av árliga blokkstuðlinum úr Danmark.

Danska stjórnin boðaði frá, at hon als ikki kundi taka undir við føroyska uppskotinum. Danski forsetisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, framførdi á tíðindafundi, sum hann einsamallur, uttan at siga føroysku samráðingarnevndini frá, helt í einum steðgi í samráðingunum, at føroyingar kravdu í posa og sekk, og at teir ynsktu eina skiftistíð, sum í ringasta føri kundi føra við sær eina 70 ára niðurlagingartíð av blokkinum. Nyrup segði í hesum sambandi, at danska stjórnin hevði bjóðað landsstýrinum eina 4 ára skiftistíð.

Føroyska samráðingarnevndin hevði eftir hetta egnan tíðindafund, har víst varð á, at samráðingartónin var sera harður, og at danska stjórnin hevði misskilt uppskotið hjá landsstýrinum.

Nógv varð eftir hetta skrivað í donsku bløðunum um føroyska uppskotið til sáttmála millum londini bæði, og ikki var tað heilt frítt, at gjøldur varð gjørt burtur úr føroyska uppskotinum í donsku fjølmiðlunum. Eisini í føroysku fjølmiðlunum varð nógv gjørt burturúr málinum, og gjørdu andstøðupolitikkarar eisini sínar viðmerkingar til málið – hetta tíðum við tónanum: *hvat søgdu vit.*

Landsstýrið gjørdi tó greitt eftir samráðingarnar, at tað helt fast við ætlan sína,– og at næsti samráðingarfundur fór at verða í næstu framtíð.

## Danska stjórnin greiða støðu

Støðan hjá táverandi donsku stjórnini, við Poul Nyrup Rasmussen á odda, var frá fyrsta degi rættiliga greið mótvegis føroyska útspælinum. Hetta gjørdi Nyrup eisini greitt fleiri ferðir, m.a. á Fólkatingi 6. apríl 2000, tvær vikur eftir fyrstu samráðingarnar og ein lítlan mánaða undan øðrum samráðingarumfari, tann 2. mai 2000 (www.folketinget.dk):

”*Hovedindholdet for det fremtidige, økonomiske forhold mellem Danmark og et suverænt Færøerne må være, at*

- *bloktilskuddet falder bort.*
- *alle tjenester, som Færøerne efter aftale får varetaget af Danmark, må financieres af Færøerne.*
- *eksisterende aftaler mellem staten og Færøerne tages op med henblik på genforhandling.*
- *grundlaget for en økonomisk overgangsperiode vil for regeringen være en afviklingsperiode på 3-4 år.*”

Hartil boðaði Nyrup eisini frá, at danska stjórnin ynskti eina loysn innanfyri Ríkisfelagsskapin. Hendan loysn fekk eisini drúgva tíð í røðuni á Fólkatingið 6. apríl 2000, har Nyrup vísti á, hvørjir møguleikarnir vóru innanfyri Ríkisfelagsskapin.

Samanumtikið kann sigast, at føroyska samráðingarútspælið fekk kalda móttøku, meðan roynt var at ”lokka” við einum donskum uppskotið, ið gav føroyingum rúmari ræsur innan fyri Ríkisfelagsskapin.

## Samráðingarfundir 2. mai, 15. juni og 26. oktober 2000

Eftir tann fyrsta samráðingarfundin 17. mars 2000 var "vøllurin kritaður upp". Langt var alla tíðina millum partarnar og lítið konstruktivt tóktust koma burturúr teimum samráðingum, ið vóru í mai og juni mánaða í 2000.

Landsstýrið gjørdi í hesum tíðarskeiði nakað burturúr at draga inn útlendskar serfrøðingar og vísa á onnur dømi um fullveldistøkur, ið hvør í sínum lagi vístu á, at føroyingar vórðu ikki rætt viðfarnir av dønum.

## Samráðingarnar enda 26. okt. 2000

Til samráðingarfundin 26. okt. varð lagt upp til, at nú mátti okkurt munagott henda, um samráðingarnar skuldu halda fram, og um komast skuldi á mál við fullveldisætlanini. Hetta vísti løgmaður eisini á í samráðingaruppskotinum, sum varð almannakunngjørt áðrenn samráðingarfundin 26. okt.

Greitt er, at tónin varð skerpaður til hendan fjórða samráðingarfundin – og eftir at samráðst hevði verið í nakrar tímar, slitnaði fundurin. Landsstýrið helt ein tíðindafund, har boðað varð frá, at landsstýrið staðfesti, at danska stjórnin ikki var sinnað at samstarva við einar sjálvstøðugar Føroyar, soleiðis sum landsstýrið hevði lagt upp til á fundi 17. mars 2000. Á tíðindafundinum varð eisini gjørt greitt, at ein fólkaatkvøða skuldi verða um fullveldisspurningin, har Føroya fólk skuldu taka avgerð um framtíðarstøðu sína. Tað var tó ógreitt, hvat spyrjast skuldi um á fólkaatkvøðuni og nær fólkaatkvøðan skuldi verða.

## Fólkaatkvøða í apríl 2001

Eina góða viku seinni, 2. nov. 2000, boðaði landsstýrið frá, at fólkaatkvøða um nýggja fullveldisætlan skuldi verða í apríl 2001. Á hesari fólkaatkvøðu skal veljarin spyrjast, um hann tekur undir við, at (www.fullveldi.fo):

- føroyingar taka ábyrgd av øllum málsøkjum innan fyri eitt nærri ásett áramál
- heildarveitingin verður minkað burtur

- tá ið komið er á mál, verða Føroya fólk spurd, um tey taka undir við, at føroysk grundlóg verður sett í gildi
- tá ið grundlógin er sett í gildi, eru Føroyar fullveldisríki.

## *Fólkaatkvøðan avlýst*

Frá tí, at avgerðin um fólkaatkvøðu varð tikin, og fram til februar 2001, stungu nógvir trupulleikar seg upp í landsstýrinum. Flokkarnir vóru ósamdir um endamálið við fólkaatkvøðuni. Harumframt vísti danska stjórnin eisini á, at hendan fólkaatkvøða var at rokna sum ein atkvøða um fullveldið ella ikki, og um meiriluti var fyri uppskotinum, so varð hetta at rokna sum byrjanin uppá tað 4 ára longu skiftistíðina, sum danska stjórnin hevði bjóðað landsstýrinum. At danska stjórnin tulkaði fólkaatkvøðuna á henda hátt ávirkaði eisini, hvat føroysku politikkarir, flokkar og føroyingurin sum heild helt um málið – og var tað ein sannroynd, at tað vóru ikki nógv, ið kundu taka undir við eini 4 ára skiftistíð.

Nakað undan ætlaðu fólkaatkvøðuni varð gjørd ein veljarakanning, har spurt varð , um fólk tóku undir við spurningunum, íð fólkaatkvøðan skuldi vera um. Veljarakanningin vísti, at so stór mótstøða var ímóti uppskotinum hjá landsstýrinum, at tað fór at fella. Hetta gjørdi trupulleikarnir í samgonguni enn størri. Fólkaflokkurin gjørdi nú greitt, at teir ikki longur tóku undir við at hava fólkaatkvøða. Sjálvsstýrisflokkurin hevði nøkulunda somu støðu, meðan Tjóðveldisflokkurin var ímóti at avlýsa fólkaatkvøðuna.

Stórt stríð tók seg nú upp í samgonguni um hendan spurningin. Tjóðveldisflokkurin gjørdi greitt, at hann fór at leggja uppskotið um fólkaatkvøðu fyri Løgtingið undir øllum umstøðum, meðan Fólkaflokkurin ikki vildi ganga við til hetta. Løgmaður var um hetta mundi uttanlanda, men gav tó Tjóðveldisflokkinum boð um, at varð fólkaatkvøðan løgd fyri Løgtingið, so varð samgongusamstarvið endað. – Tjóðveldisflokkurin segði seg ikki vilja slíta samgonguna, og harvið seta fullveldismálið uppá spæl, og legði sostatt ikki nakað uppskot fyri løgtingið .

## *Samgonguavtala 9. mars 2001*

Samgongan kom kortini í svára kreppu orsaka ósemju í fullveldisspurninginum, og ivasamt var, um samgongan aftur fann stevið. Eftir nakrar fundir í samgonguni varð avtala tó gjørd um fullveldisspurningin Hetta hendi 9. mars 2001, eitt lítið ár eftir fyrsta samráðingarfundin við donsku stjórnina um fullveldisspurningin.

Samgonguavtalan førdi við sær, at uppskot til samtyktar um sjálvstýri Føroya fólks varð lagt fyri Løgtingið 13. mars. 2001 og samtykt 20. apríl sama ár. Samtyktin staðfestir, at Føroya fólk er tjóð við ómissandi og framhaldandi sjálvsavgerðarrætti[8], og ásannandi hetta tekur Løgtingið undir við, at farið verður undir eina (hesa) miðvísu fullveldisætlan:

- at farið verður undir beinanvegin at fáa øll málsøkir undir føroyskt málsræði, og at heildarveitingin minkar burtur
- málsøkir (tey, sum nevnd eru niðanfyri) koma undir føroyskt ræði og heildarveitingin verður minkað tilsamans í minsta lagi 300-400 mio. kr. galdandi frá í seinasta lagi 1. jan. 2002.
- At øll málsøkir (undantikin tey, ið knýta seg beinleiðis afturat fullveldistøku) fara undir føroyskt málsræði í seinasta lagi 2012 eftir tí ætlan, sum áður er fráboðað:
    - *Í seinasta lagi 1. januar 2002*: Fólkakirkja, skúlamál, revsirættarmál, persónsrættarmál, húsfólkarættarmál, arvarættarmál, fíggjarrættarmál, havumhvørvisvernd, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar og Vága Floghavn fara undir føroyskt málsræði.
    - *Í seinasta lagi 1. januar 2004*: Dómstólar, ákæruvald, fongsulsmyndugleikar, kriminalforsorg og almannamál fara undir føroyskt málsræði.
    - *Í seinasta lagi 1. januar 2006*: Løgverja, gjaldoyramál, peningamál, fíggingarvirksemi, sjóvinnumál, flogferðslumál, kortlegging og fjarskiftismál fara undir føroyskt málsræði.
    - *Í seinasta lagi 1. februar 2008*: Tilbúgving og heilsumál fara undir føroyskt málsræði.

[8] Rættur til til at taka egnar avgerðir.

- Búskapargrunnur Føroya verður settur á stovn í hesi tingsetuni. Búskapargrunnurin skal tryggja ein sjálvberandi búskap, hýsa heildarveitingini, gjaldsførisinntøkum og møguligum oljuinntøkum.
- Áðrenn fullveldistøkan verður framd, verður Føroya fólk spurt á fólkaatkvøðu.

## Fullveldisætlanin vend á høvdið

Við samgonguavtaluni frá 9. mars 2001 kann sigast, at fullveldisætlanin varð vend á høvdið. Upprunaætlanin um, at fullveldið skuldi takast frá fyrsta degi og avtalur, skiftistíð o.s.fr. hareftir skuldu gerast við danir, varð broytt. Ætlanin varð nú at ”tøma heimastýrislógina fyri innihald” tvs. yvirtaka øll málsøki til føroyskt málsræði og harumframt einsíðis og stigvíst minka blokkstuðulin. Tá øll málsøki eru komin undir føroyskt málsræði, og blokkstuðulin er burtur, verður fullveldistøkan endaliga framd.

Fyrstu stigini av hesi ætlan blivu gjøgnumførd á heysti í 2001, tá okkurt smærri málsøkið varð yvirtikið, og við árskifti 2002, tá m.a. skúlamál og partar av almannamálunum vórðu yvirtikin. Samstundis varð blokkstuðulin minkaður við 366 mio. kr. á fíggjarlógini fyri 2002.

Hóast partar av samgonguavtaluni vórðu gjøgnumførdir sum ætlað, varð longu við árskifti 2001 / 2002 greitt, at hendan ætlan ikki fór at halda fult út. Til dømis vórðu fólkakirkjan, tey ymisku rættarmálsøkini og Vága Floghavn ikki yvirtikin pr. 1. jan. 2002. Harumframt eydnaðist tað ikki at seta á stovn Búskapargrunnin, tí at ósemja var millum samgonguflokkarnir um, hvussu útgaldsskipanin úr grunninum skuldi verða.

## Løgtingsvalið 2002 og nýggj samgonga

Í hvønn mun samgonguavtalan frá 9. mars 2001 verður førd víðari av nýggja landsstýrinum, sum varð skipað eftir løgtingsvalið 30. apríl 2002, kann bert tíðin vísa. Samanborið við løgtingsvalið í 1998, tá flokkarnir, ið vildu broyta viðurskiftini millum Føroyar og Danmark vunnu valið, so stóð javnt millum fullveldisflokkarnir og teir meiri sambandssinnaðu flokkarnir við valið í 2002. Fullveldissamgongan misti við valið

meirilutan[9] við tað, at sjálvsstýrisflokkurin bert fekk eitt løgtingsumboð í mun til tvey við valið í 1998. Sostatt stóð á jøvnum millum tað ”gomlu” samgonguna og tað ”gomlu” andstøðuna, og av somu orsøk gjørdist teir smáu flokkarnir heilt avgerandi, tá nýggj samgonga skuldi skipast eftir valið. Nýggja samgongan varð skipað 6. juni 2002 millum Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin, Miðflokkin og Sjálvstýrisflokkin – tað vil siga teir somu flokkarnir, sum vóru í Fullveldissamgonguni, umframt Miðflokkin.

Sjálvar samgongusamráðingarnar vóru rættiliga drúgvar og bóru eyðkenni av, at flokkarnir vóru ósamdir um m.a. hvussu farast skuldi fram á fullveldisleið. Samanborið við tað samgonguskjalið, sum var grundarlag undir Fullveldislandsstýrinum, so eru orðingarnar um fullveldisspurningin munandi linari í samgonguskjalinum hjá nýggju samgonguni. Hóast hetta verður framhaldandi arbeitt við at yvirtaka málsøki, og er endamálið eisini hjá hesari samgonguni, at Føroyar gerast sjálvbjargnar, so Føroya fólk uttan fíggjarligar og umsitingarligar bindingar kann gera av framtíðarstøðu sína.

[9] Helena Dam á Neystabø, ið við valið í 1998 stillaði upp fyri Sjálvstýrisflokkin, fór í 2001 úr Sjálvstýrisflokkinum og uppí Javnaðarflokkinum. Við valið í 2002 royndi hon eisini at bliva uppstillað fyri Javnaðarflokkin, men hetta eydnaðist ikki.

# Bókmentir



| | |
|---|---|
| Apostle, Richard, Dennis Holm, Gestur Hovgaard, Ólavur Waag Høgnesen, and Bjarni Mortensen. 2002. | *The Restructuring of the Faroese Economy.* Keypmannahavn. Samfundslitteratur. |
| Finansieringsfonden af 1992. | Vedtægterne for Finansieringsfonden af 1992. |
| Føroya Landstýri. 1999. | *Hvítabók*. Tórshavn. Føroya Landsstýri. |
| Føroya Landsstýri. 1994. | *Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre.* 17. nov. 1994. |
| Føroya Landsstýri. 1993a. | *Erklæring fra Færøerne landsstyre.* 1. feb. 1993. |
| Føroya Landsstýri. 1993b. | *Rammeaftale mellem den danske regering og Færøernes landsstyre om refinansiering af landskassens gæld.* 28. maj. 1993. |
| Føroya Landsstýri. 1993c. | *Aftale af 12. oktober 1993 mellem den danske regering og Færøernes landsstyre om refinansiering i 1994 og kapital tilførsel til færøske banker m.v.* 12 okt. 1993. |
| Føroya Landsstýri. 1993d. | *Protokollat af 12. oktober 1993 om forhandling mellem den danske regering og Færøernes landsstyre.* |
| Føroya Landsstýri. 1992. | *Kunngerð um yvirtøku av ráevnum í undirgrundini.* Føroya Landsstýri. Tórshavn |
| Holm, Dennis. 1997 | *Har den økonomiske krise på Færøerne medført, at Hjemmestyreordning reelt er ophævet?*, ikki-útgivið studenta-projekt við Aalborg Universitet, 1997. |
| Mørkøre, Jógvan. 2002 | *Tíð – og pengar – avgerandi fyri stuðulin til sjálvstýrispolitikk.* Dimmalætting 15. mars 2002. |

| | |
|---|---|
| Rigsombudsmanden på Færøerne. 1998. | *Beretning 1998*. Statens Information, Publikationsafdelingen. København. |
| Statsministeriet. 1992. | *Pressemeddelelse 6 okt. 1992*. København. Statsministeriet. |
| Sølvará, Hans Andrias. 2002. | *Løgtingið 150 – Hátíðarrit 1*. Tórshavn. Føroya Løgting. |